# Glímarar rætta hjálpandi hond til offur

**NSÍ og Reyð Krossur lótu politisk valevni glímast undir innsavning av peningi til jarðskjálvta offur í Iran**

NEYÐHJÁLP
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*



*Finalan kom at standa millum Bill Justinusen úr Miðflokkinum og Rubek Lillaa úr Hinum Stuttliga Flokkinum*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Fitt av fólki leitaði sær leygardagin í Ítróttarhøllina í Runavík til gaman og álvara, nevniliga fyri at síggja valevni frá teimum politisku flokkunum fara til hendurs í fullari semju um at útvega peningaliga hjálp til offur fyri jarðskjálvta vanlukkuna í Bam, Iran. Allur peningur sum kom inn skuldi óskerdur fara til neyðhjálpina.

Tað skiltist á lagnum at fólk vóru sum heild væl nøgd við tiltakið.

- Tað gekk ógvuliga væl við øllum og vit vóru nøgd við at 150-200 fólk møttu upp, sigur Valdemar Olsen, samskipari hjá Nes Sóknar Ítróttarfelag.

Stuttligari kundi tað neyvan blíva. Sterkasti glímari vísti seg at vera eingin minni enn Rubek Lillaa úr Hinum Stuttliga Flokkinum.

Meðan NSÍ við hjálp av bæði hornorkestri og einum væl uppløgdum Hilmar Jan Hansen stóð fyri gamansleikinum, tók Reyði Krossur hond um tað meira álvarsliga. Atgongdin til tiltakið var ókeypis men bússan gekk runt, girokort og annað tilfar varð spreitt út og fólk vórðu uppmuntrað til at ringja eitt telefonnummar sum automatiskt dregur 100 krónur til Reyða Kross umvegis telefonrokningina.

Sum skilst hevði tiltakið fyrimynd í Týsklandi har ítróttarfeløg í seinastuni hava skipað fyri innsavning til frama fyri offrini í Bam.

- Ógvuliga lítið er avsett á Løgtingsins fíggjarlóg til neyðhjálp, viðmerkir Valdemar Olsen.

- Men kanska hesir góðu glímarar fara at broyta hetta um teir verða valdir inn.

# Kenna løgmann frá Trølla Pæturi

**Valstríðið er í hæddini. Nógv tos um politikk, og vallyftini flúgva runt í luftini. Men nøkur eru, sum búgva í hesum landinum, sum ongan valrætt hava enn. Tey kenna ikki nógv til politikk, men onkur politikkari er teimum kendur kortini. Sosialurin hevur tosað við fýra børn, sum ganga í 1. b í skúlanum við Ósánna**




*Tey fýra, Elna, Hákun, Ásla og Gulak kenna av góðum grundum ikki nógv til politikk. Men tey vita, hvussu løgmaður sær út frá nýggja Trølla Pætur filminum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

PRÁT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– S – O – S – I – A – L – U – R – I – N. Har stendur sosjialurin, er eitt tað fyrsta, sum sjey ára gamli Gulak sigur, tá vit koma á gátt.

– Eg veit væl, hvat tað er…tað er eitt blað, heldur hann fram. Hini trý úr flokkinum nikka eisini fyri at vísa, at tey eisini kenna.

– Eg havi hoyrt, at tá man tekur mynd við sovorðnum, so kemur man í blaðið, sigur Hákun og peikar á myndatólið hjá myndamanninum.

Men tá vit byrja at siga teimum, hvat tað er, vit eru komin at tosa um, rista tey við høvdinum og siga, at tey vita onki um politikk.

Tá tey verða spurd um tey vita, hvør er løgmaður, siga tey fyrst nei.

– Eg veit, hvussu hann sær út. Eg havi sæð hann í nýggja Trølla Pætur filminum, men eg veit ikki, hvussu hann eitur. Eg haldi, at hann eitur Jógvan, sigur Hákun. Og tá kemur lív í hini trý. Tey hava eisini sæð løgmann í Trølla Pætur filminum.

– Hann gav Trølla ommuni og Trølla Pætur, sigur Ásla.

– Eisini politistunum, skoytir Elna uppí.

– Å, er tað hann? Hann hevur verið hjá okkum, sigur Gulak, men heldur ikki hann minnist navnið á løgmanni.

### Kenna ongar

Hesir fýra næmingarnir í fyrsta flokki siga øll, at tey vita onki um politikk, og ei heldur kenna tey nakran politikkara. Ella rættari sagt næstan ongan.

– Eg kenni ein. Eg haldi, at hann eitur Jógvan. Hann eigur í øllum førum nógvar pengar í pengabankanum harúti, sigur Hákun og peikar móti vindeyganum.

Gulak heldur, at Jógvan politiovastin í Trølla Pætur filminum átti at bestemmað í Føroyum.

– Hann er ræðuliga strangur, so tað kundi hann gott, sigur Ásla og nikkar við Gulaki.

– Eg haldi, at allir politikkararnir hava sæð, hvussu man ger Trølla Pætur filmin, so um tað passar, so hevði eg viljað verið politikkari, sigur Hákun og sær sera hugsunarsamur út. Men so ristir hann við høvdinum og sigur, at hann heldur vil verða tannlækni.

Hini trý, Elna, Ásla og Gulak siga tað sama. Tey vilja heldur ikki verða politikkarar, tá tey verða stór.

# Kjakið á Norðlýsinum ov grovt

**Í gott eitt ár hevur kjakið á Norðlýsinum koyrt. Trupulleikarnir hava ikki verið stórir, tó at tað hevur verið púra opið. Men framyvir verður tað stýrt av blaðleiðsluni, tí at ov harðligar viðmerkingar hava verið koyrdar út á kjakið, síðani valstríðið byrjaði**

KJAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum, heldur tað vera stórt spell, at kjakið hjá teimum nú má verða stýrt, tí at nøkur ikki duga at sýna sømiligan atburð inni á kjakinum*

**Klaksvík:** Kjakið á Norðlýsinum hevur verið dúgliga vitjað, síðani tað byrjaði fyri einum ári síðani. Oliver Joensen, blaðstjóri, sigur, at teir hava verið vælnøgdir við tað, sum hevur verið. Okkurt hevur kanska verið heldur óheppið, men sum heild hevur onki verið at finnast at á kjakinum. Inntil nú.

– Síðani valið varð útskrivað, hava vit havt fleiri innlegg í kjakinum, sum eru beinleiðis grov og leggja eftir persónum, og tað ber ikki til, sigur Oliver. Talan er um skuldsetingar móti politikkarum, sum eru uppstillaðir til løgtingsvalið.

Tí er avgerð nú tikin um, at kjakið framyvir verður stýrt. Tað vil siga, at um ein ynskir at skriva eina viðmerking til kjakið á Norðlýsinum hevur ein tveir møguleikar.

Antin teknar ein seg sum lim á kjakinum og fær eitt loyniorð, ella kann ein senda ein teldupost til blaðleiðsluna, sum so skal góðkenna innleggið, áðrenn tað verður alment.

### Royndarár

Hetta árið, har kjakið hevur koyrt, hevur verið eitt sokallað royndarár. Kjakast hevur serliga verið um ítrótt og ymisk viðurskifti í Klaksvík. Sum heild hevur kjakið roynst væl, og hevur tað fingið góðan respons bæði heima og serliga millum føroyingar uttanlanda. Tað ger, at Oliver vil ikki koyra tað burtur. Men heldur royna at stýra tí framyvir, so sleppast kann undan keðiligum og óhepnum pástandum, sum kunnu raka persónar meint.

– Tað er stórt spell, at vit mugu í holt við at stýra kjakinum, men vit hava kortini vitað um vandan við einum opnum kjaki allatíðina, og tí var hetta fyrsta árið sett sum royndarár, sigur blaðstjórin á Norðlýsinum, sum samstundis leggur afturat, at talan helst er um óumhugsað innlegg enn óreinheitir.



# Hergeir skilir einki

**Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðuroynni, Hergeir Nielsen, dugir ikki at finna nakra grundgeving fyri, at Tjóðveldisflokkurin fær so lítla undirtøku í Suðuroynni í nýggju veljarakanningini. Sambandsflokkurin heldur, at hetta vísir álit til flokkin**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin stendur til at taka tingmannin hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðuroynni. Ikki nokk við tí. Tjóðveldisflokkurin er á veljarakanningini á einum fjórða plássi - 0,5% eftir Fólkaflokkin. Javnaðarflokkin varðveitir í sína sterku støðu í Suðuroynni og vildi fingið tveir tingmenn, um úrslitið av veljarakanningini var valúrslitið.

Tingmaður Tjóðveldisfloksins í Suðuroynni, Hergeir Nielsen, sigur, at úrslitið av hesari veljarakanningini fellur honum tungt.

– Eg dugi ikki at finna nakra grundgeving fyri hesum úrslitinum, sigur Hergeir Nielsen.

Hann hevur umboðað Tjóðveldisflokkin á tingi, valdur í Suðuroynni, í fleiri valskeið. Sambært Veljarakanningini hjá Sosialinum og Fynd í samstarvi við Føroya Tele sleppur Hergeir ikki aftur á ting.

Men Hergeir roknar sjálvur við einum væl betri úrslitið enn veljarakanningin sigur.

– Tað nívur sjálvandi suðuroyingar, at tað er so stórt arbeiðsloysi í oynni. Men politiskt hevur Suðuroyggin av verandi samgongu fingið sera góða viðferð, og andstøðan hevur einki gjørt fyri oynna, sigur Hergeir Nielsen.

### Álit á politikkin

Johan Dahl, tingmaður fyri Sambandsflokkin í Suðuroynni, fegnast um góða úrslitið hjá flokkinum í veljarakanningini.

– Ein kanning er ein kanning, og tað skulu vit minnast til. Men eg haldi, at hetta staðfestir, at fólk hava álit á Sambandsflokkinum, og vit halda tað, vit lova, sigur Johan Dahl.

Tingmaðurin hjá Sambandsflokkinum heldur, at Suðuroyggin er ein ríkisfelagsskapsoyggj burturav, og tað vísir úrslitið av hesari veljarakanningini eisini.

– Fólk eru eisini troytt av hasum fullveldistvætlinum, sigur ein avgjørdur Johan Dahl.

Persónliga hevur Johan Dahl roknað við at fáa minni undirtøku í ár enn við undanfarna val, tí hann hevur verið arbeitt í Kollafirði, men hendan veljarakanningin fær hann at broyta hugsan hesum viðvíkjandi.

# Hans Pauli er ovfarin

**Hans Pauli Strøm er ovfarin av góða úrslitinum hjá Javnaðarflokkinum í Norðstreymi. Ja men tað er heilt ótrúligt, at møguleikin fyri at vinna tingsessin longu er í hondunum, sigur hann. Heðin Zachariasen úr Fólkaflokkinum hevur góðar vónar um tingsess og væntar eitt ómetaliga spennandi val í Norðstreymi**

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Ja men tað er heilt ótrúligt, at møguleikin fyri at vinna tingsessin longu er í hondunum, sigur Hans Pauli Strøm, sum sambært veljarakanningini liggur til at vinna løgtingssessin frá Tjóðveldisflokkinum.

Hans Pauli sigur, at veruligi valdysturin í Norðstreymi byrjar ikki fyrr enn í kvøld og at hann longu nú skal vera við í dystinum um tingsess, hevði hann ikki væntað. Hann sigur, at endamálið er sjálvsagt at vinna Javnaðarflokkinum ein tingsess úr Norðstreymi, men nú trýr hann veruliga upp á tað, og hann fer við góðum treysti undir seinastu vikuna av valstríðnum.

Spurdur, um hví Javnaðarflokkurin stendur seg so væl í Norðstreymi, svarar Hans Pauli, at hann heldur ikki at samgongulimirnir (Heðin Zachariasen og Niklái Petersen, blðm) hava fingið stórvegis av skaftið seinasta valskeiðið og at Javnaðarflokkurin hevur verið miðvísur í andstøðuarbeiðinum.

– Úrslitið av veljarakanningini ger, at stríðsviljin veruliga tendrast hjá mær, sigur Hans Pauli Strøm

### Góðar vónir

Heðin Zachariasen, sum hevur umboða Fólkaflokkin farna valskeiðið, hevur góðar vónir um at vinna annan av tingsessunum í Norðstreymi. Eins og Hans Pauli, greiðir Heðin Zachariasen frá, at veruliga valstríðið í Norðsteymi ikki fyrr enn í kvøld.

Spurdur um, hvørji avrik hann kann vísa sum tingmaður seinastu 20 mánaðirnar, svarar Heðin, at nógv er komið burturúr.

Hann nevnir, at skjøtil er settur á arbeiðið við Ellisheiminum og tunlinum til Tjørnuvíkar, og tað er stór frambrot, tá hugsað verður um, at undanfarnir tingmenn bert hava tosað um at gera nakað á teimum økinum, meðan farna samgongu veruliga framdi nakað í verki

Heðin sigur seg vænta eitt ómetaliga tætt val, sum ikki verður avgjørt fyrr enn í seinastu sekundunum, sum hann málber seg.

# – Flogvallarmálið gevur okkum undirtøku

**– Tað er hent nógv í Vágunum seinastu árini, men eftir mínum tykki skuldi meira verið hent, sigur Marjus Dam, tingmaður Sambandsfloksins í Vágunum. Hann gevur fullveldismálinum skyldina fyri, at flogvøllurin ikki er útbygdur**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*

Sambandsflokkurin stendur til at fáa tveir tinglimir í Vágunum við komandi val sambært seinastu veljarakanningini, og Marjus Dam fegnast sjálvandi um hesa framúr stóru undirtøkuna flokkurin fær í Vágunum sambært kanningini í Sosialinum í dag.

– Um Sambandsflokkurin hevði komið til valdið í 1998, og fullveldismálið ongantíð var komið á dagsskránna, hevði flogvøllurin staðið útbygdur í dag, sigur Marjus Dam avgjørdur.

Hann sigur, at so hevði danski statskassin staðið fyri hesi útbyggingini, og tað hevði komið føroyingum til góðar. Undir núverandi umstøðum er vandi fyri, at føroyingar fara at fáa eina eyka rokning uppá nakrar hundrað milliónir krónur, tí at flogvøllurin skal útbyggjast undir øllum umstøðum.

Hetta er sjálvandi lætt at siga, nú seks ár eru liðin síðan fullveldismálið kom ovast á breddan, men Marjus Dam sigur, at vágafólk eru samd í honum í hesum, og tað kundi veljarakanningin eisini bent á.

Vágarnar hava fingið bæði ein undirsjóvartunnil og ein tunnil til Gásadals, men hetta er eftir øllum at døma ikki nóg mikið, tí veljarakanningin er ikki góð fyri samgonguflokkarnar.

### Skattalættin gevur atkvøður

– Hendan samgongan hevur latið 400 milliónir krónur, sum Føroya fólk av røttum eigur, av hondum, sigur Marjus Dam, og hann metir, at fullveldismálið er ein álvarslig hóttan móti vælferðini í Føroyum.

Um orsøkirnar til framgongdina hjá sambandinum í Vágunum nevnir Marjus millum annað skattalættan, sum tó ongantíð er kunngjørdur og lagdur fram fyri veljaran.

– Um fólk fingu meira at vita um skattalættan, sum gevur lág- og miðalinntøkum skattalætta, hevði undirtøkan møguliga verið enn størri, sigur Marjus Dam, sum ásannar, at flokkurin burdi upplýst meira um tann "hemmeliga" skattalættan.

# – Vit fáa eisini næsta mannin

**Fólkaflokkurin stendur til at missa tann næsta valdømisvalda tingmannin í Suðurstreymoyar valdømi, men formaðurin í tingbólkinum, er sannførdur um, at flokkurin megnar at taka tann næsta mannin frá sambandinum**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*

– Tað fer ikki at henda.

So avgjørdur er Óli Breckmann um veljarakanningina, sum sigur, at flokkurin fer at missa tann eina valdømisvalda tingmannin í Suðurstreymi. Óli er sannførdur um, at flokkurin fer at fáa eitt betri úrslit enn kanningin vísir.

– Fólkaflokkurin stendur seg sjáldan væl í veljarakanningum, og hesuferð er einki undantak. Tað er eitt gott útgangsstøði hjá okkum, at veljarakanningar spáa okkum eina afturgongd, tí tað plagar at fáa fólk úr startholinum, sigur formaðurin í tingbólki Fólkafloksins.

Óli Breckmann heldur, at Fólkaflokkurin heldur missir til sambandið enn til tjóðveldið, tí at hóvlig fólkafloksfólk kanska eru bangin fyri samstarvinum hjá Fólkaflokkinum við Tjóðveldisflokkin.

Hann vil vera við, at Fólkaflokkurin er ein garantur fyri borgarligum politikki, tí at Sambandsflokkurin fer helst í samgongu við Javnaðarflokkin.

Spurdur um hann kennir seg hóttan á listanum, svarar Óli Breckmann, at mann altíð skal kenna seg hóttan í politikki, og tað ger hann eisini hesuferð.

Annars heldur fremsti maðurin hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymoy, at valstríðið hesuferð hevur verið sera tamt, og nógv merkt av, at SvF hevur stýrt stríðnum.

# Borgarstjórasessurin hevur kostað

**Sambært nýggjast veljarakanningini stendur Tjóðveldisflokkurin at missa mannin á Sandoynni. Páll á Reynatúgvu heldur orsøkina vera, at hann valdi at siga borgarstjórasessin á Sandi frá sær**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*

– Tað eru fleiri fólk, sum hava fýlst á mína avgerð um at fara í landsstýrið og taka meg aftur sum borgarstjóra heima á Sandi, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður við almannamálum seinastu knøppu tvey árini.

Tað er eingin loyna, at Páll á Reynatúgvu fær flest atkvøður í heimbygdini á Sandi, og tá hann tók seg úr starvinum sum borgarstjóri, misti hann nakað av undirtøku á staðnum.

Páll hevur verið valdømisvaldur tingmaður hjá tjóðveldinum tvey tey seinastu valini, men nú stendur hann fyri falli. Tað er tó sera hørð kapping millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin um tann næsta mannin aftanfyri Javnaðarflokkin.

Páll á Reynatúgvu skilir væl, at fólk á plássum sum Sandoynni heldur vilja satsa uppá ein politikara, sum førir seg fram sum lokalpolitikara. Hendan møguleika hevur hann ikki havt á sama hátt, nú hann hevur sitið í landsstýrinum heldur enn í tinginum. Páll leggur tó dent á tey framstig, sum eru gjørd á farleiðini millum Sandoynna og miðstaðarøkið.

– Vit hava fingið nýtt skip, ferjulegurnar eru útbygdar og vegurin millum Havnina og Gomlu Rætt er júst upplatin, sigur Páll um avrik samgongunnar fyri hansara valdømi. Eisini vísir hann á ætlanirnar um ein list- og ítróttarskúla á Sandoynni, sum peningur nú er játtaður til.